## UTTAN ÚR HEIMI

## Krevja breiða semju

Í Danmark hevur stjórnin hótt við at fremja tann nógv umrødda kommunubygnaðin, sjálvt um Sosialdemokratarnir hava vent ætlanini bakið. Tá samráðingarnar slitnaðu í síðstu viku, segði stjórnin, at so fór hon at fremja ætlanina saman við Danska Fólkaflokkinum.

Men tað vilja teir donsku borgarstjórarnir ikki. Ein spurnarkanning hjá Jyllandspostinum vísir, at 92 prosent av teimum spurdu borgarstjórunum vilja hava eina breiða semju um kommunubygnaðin. Tað merkir, at teir vilja hava stjórnina at semjast við Sosialdemokratarnar heldur enn Danska Fólkaflokkin. Meiri enn helmingurin av borgarstjórunum siga samstundis, at semjast stjórnin og Sosialdemokratarnir ikki, eigur stjórnin at útseta ætlanina.

Um tað var hendan kanningin, sum var orsøkin, er ikki greitt, men mikukvøldið sendi stjórnin boð eftir Sosialdemokratunum, og tann fyrsti fundurin verður fríggjadagin. Sosialdemokratarnir hava sagt, at fáa teir ikki nakrar broytingar í uppskotið, fara teir at rætta bygnaðin aftur, koma teir í stjórn aftan á næsta val.

## Vístu myndir av gíslum

Í næstan tveir mánaðir hava tríggir italiumenn sitið gíslar í Irak, og mikukvøldið vísti arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera eina sjónbandsupptøku av teimum trimum monnunum. Upptøkan var frá 31. mai.

Á bandinum greiddi ein av gíslunum frá, at teir hava verið væl viðfarnir, síðani teir vórðu tiknir, og at teir høvdu tað gott. Ein av burturflytarunum segði á bandinum, at italska stjórnin eigur at hugsa um, hvat kann henda teimum trimum monnunum. Hann bað italska fólkið mótmæla krígnum í Irak og fordøma amerikanska forsetan og ta italsku stjórnina.

Gíslarnir vóru upprunaliga fýra, men burturflytararnir beindu fyri tí fjórða, eftir at italska stjórnin hevur sýtt fyri at taka teir 2.700 italsku hermenninar í Irak. Bara USA og Bretland hava fleiri hermenn har.

## Ósemja í A.P. Møller

Tað vakti stóran ans í Danmark, tá landsins størsta vinnufelag, A.P. Møller, kunngjørdi, at ein av felagsins stjórum var farin frá eftir innanhýsis ósemju í leiðsluni.

Tað hevur sanniliga ikki verið vanligt, at A.P. Møller hevur kunnað almenningin um innanhýsis ósemjur. Tá fólk í leiðandi størvum eru farin frá, hevur frágreiðingin vanliga verið, at viðkomandi var farin frá av persónligum ávum. Men mikudagin kunngjørdi stórfyritøkan, at stjórin í oljudeildini hjá felagnum, Kjeld Fjeldgaard, var farin frá orsakað av innanhýsis ósemju í leiðsluni.

Danskir fjølmiðlar eru á einum máli um, at stjórin í Mærsk Olie og Gas kann ikki vera farin frá, tí hann hevur ikki verið nóg dugnaligur. Víst verður á, at umsetningurin hjá Mærsk Olie og Gas var 19,2 milliardir krónur í fjør, og at avlopið var 6,5 milliardir krónur. Kjeld Fjeldgaard hevur arbeitt hjá A.P. Møller síðani 1972, og hann hevur sitið í leiðsluni síðani 1991.

## Dinosaurar á Bornholm

Tann 30 ára gamli jarðfrøðingurin Jesper Milán hevur funnið fótaspor, sum benda á, at dinosaurar vóru á Bornholm fyri 170 milliónum árum síðani, skrivar Politiken.

Fyrr hava jarðfrøðingar funnið tenn av dinosaurum á Bornholm, men hetta er fyrstu ferð, at menn hava funnið teirra fótaspor á oynni. Jesper Milán sigur við Politiken, at hann hevur funnið tvey fótaspor. Annað er 70 sentimetrar til longdar, og tað heldur hann stava frá einum sokallaðum sauropadi. Teir størstu sauropadarnir kundu vera 40 metrar langir og eru størsta djór, sum hevur livað á Jørðini. Hitt fótasporið er 25 sentimetrar langt.

Jarðfrøðingar siga, at í dinosaurratíðini lá at kalla alt Danmark undir í sjógvi, men at økið kring Bornholm var oman fyri vatnskorpuna. Tí hava teir alla tíðina vitað, at skuldu teir finna tekin um dinosaurar í Danmark, skuldu teir leita á Bornholm.

# 1000 milliardir í oljugrunninum

**Tann góði oljuprísurin kemur norska oljugrunninum væl við**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Heldur oljuprísurin sær á verandi støði, kunnu norðmenn rokna við at fáa ímillum 30 og 40 milliardir krónur eyka ´+i ár.

Á fíggjarlógini hevur norska stjórnin mett, at oljugrunnurin fær einar 90 milliardir krónur í inntøku í ár, men soleiðis sum prísgongdin hevur verið, verður inntøkan einastaðni ímillum 120 og 130 milliardir, skrivar Aftenposten. Tað merkir, at einaferð í heyst verða meiri enn 1000 milliardir krónur í grunninum.

Men vandi er í hvørjari vælferð, skrivar blaðið. Tí tann góði oljuprísurin er, at tað verður dýrari at ferðast við flogfari, skipi og bili, og harafturat kann prísurin hava við sær, at keypiorkan í útlondum minkar, og tað kann ávirka norska útflutningin.

# Tey fátæku ov feit

**Fyrr var fiti ein trupulleiki hjá fólki í teimum ríku londunum, men trupulleikin breiðir seg eisini skjótt í teimum fátæku londunum**

FITI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í teimum fátæku londunum eru tað serliga kvinnur, ið ikki hava nakra útbúgving, sum hava trupulleikar við fiti. Tað sæst í einari kanning, sum umfatar 149.000 kvinnur í 37 menningarlondum. Ímillum londini eru Kina, Brasil og India.

Fyri fáum árum síðani var tann vanliga uppfatanin, at tað vóru fólk í teimum ríku londunum, sum høvdu trupulleikar við fiti, men soleiðis er ikki longur, sigur Barry Popkin, professari á lærda háskúlanum í North Carolina í USA. Hann sigur, at saman við tí veksandi trupulleikanum við fitini økjast eisini tilburðirnir av hjartasjúkum, sukursjúku, krabbameini og øðrum sjúkum.

Sjálvur heldur Barry Popkin, at bíligur matur og vantandi rørsla eru høvuðsorsøkirnar til fititrupulleikarnar í teimum fátæku londunum. Amerikanski professarin leggur afturat, at fólk í teimum fátæku londunum vita yvirhøvur ov lítið um avleiðingarnar av vánaligum ella skeivur kosti.

# Bók avdúkar ólevnað í ST

**Ein nýggj bók, ið sigur frá stórum veitslum og sexgølum, sigst vera ein røtt lýsing av arbeiðinum hjá heimafelagsskapinum**

ÓLEVNAÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast ST royndi at forða fyri, at tann nýggja bókin kom út, hava tríggir fyrrverandi medarbeiðarar hjá felagsskapinum gjørt av at geva hana út.

Teir tríggir hava arbeitt fyri ST í Kambodja, Somalia og Rwanda í fleiri ár. Teir vilja vera við, at tey, sum arbeiða í øðrum londum fyri ST, keða seg ofta og kenna seg ótrygg, og at hesir trupulleikar verða loystir við eitt nú veitslum og tí, sum teir rópa sexgølum.

Men teir vita eisini ymiskt annað at siga frá. Eitt nú skriva teir, at starvsfólk hjá ST hava kravt at fáa 15 prosent av lønini, sum lokal arbeiðsfólk hava fingið, tá teir hava arbeitt fyri heimsfelagsskapin. Teir vilja eisini vera við, at Bulgaria hevur slept fangum leysum og sent teir til Kambodja sum friðarvarðveitandi hermenn. Har hildu teir fríaðu brotsmenninir fram við sínum virksemi, og í fleiri førum neyðtóku teir kambodiskar kvinnur.

Teir tríggir høvundarnir arbeiða framvegis hjá ST, og teir kunnu ikki fáa sekkin, skrivar Reuters. Ein talsmaður hjá Kofi Annan, aðalskrivara sigur við Reuters, at tann nýggja bókin er ein sjáldsom lýsing av tí friðarvarðveitandi arbeiðinum. Meiri vil hann ikki siga um hana.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Heilsuhjálparafelag Føroya 25 ár:

# Virkið fakfelag fylt 25 ár

**Mikudagin 26. mai fylti Heilsuhjálparafelag Føroya 25 ár. Í hesum sambandi var almenn móttøka í húsum felagsins í Fr. Petersensgøtu 7 í Havn. Ása Olsen hevur verið forkvinna í felagnum síðan 1996**



*Ása Olsen, (t.h.) hevur verið forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya síðan 1996*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Heilsuhjálparafelag Føroya varð stovnað 26. mai 1979 sum eitt fakfelag við tí endamáli at fáa skipaði viðurskifti hjá heimahjálparum í Føroyum.

Í 2001 varð Heilsuskúlin á Tvøroyri settur á stovn, og síðan eru 100 heimahjálparar uppskúlaðar til heilsuhjálparar. Heimahjálpararnir ganga 10 vikur á skúlanum og eru 14 vikur í starvsvenjing á einum røktarheimi ella sambýli.

Aðalfundur felagsins var 24. apríl 2004. Um kvøldið hendan dagin var stór veitsla fyri limum og innbodnum. 270 fólk vóru til veitsluna.

Nevndin skipaði seg soleiðis: Ása Olsen, Tórshavn, forkvinna, Guðrið Klein, Tórshavn, næstforkvinna, Hanna West, Hvalba, kassameistari, Elsa B. Joensen, Klaksvík, skrivari, Hildur Johannesen, Tórshavn, nevndarlimur, Jórun í Løðu, Miðvágur, nevndarlimur, Surid Thorsteinsson, Vágur, nevndarlimur, Margareth Johannesen, Leirvík, tiltakslimur, og Gunleyg Jacobsen, Klaksvík, tiltakslimur. Forkvinnan verður vald beinleiðis á aðalfundinum. Ása Olsen hevur verið forkvinna síðan 1996.

Felagið hevur 450 aktivar limir í øllum landinum.

Føðingardagin hjá felagnum møttu umleið 70 fólk til móttøkuna, bæði teirra egnu limir og limir í øðrum fakfeløgum.



*Føðingardagin var hildin í hugnaligu felagshølunum í Fr. Petersensgøtu 7 í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjur forstjóri hjá Eimskip í Íslandi

**Nevndin á Eimskip hevur gjørt av at seta Baldur Guðnason í starv sum nýggjan forstjóra á Eimskipum**

TÍÐINDASKRIV



Baldur hevur sitið í nevndini á Eimskip Holding síðan oktober 2003. Samstundis tekur Erlendur Hjaltason seg aftur, sum forstjóri.

Nevndin í Eimskip takkar Erlendi fyri gott arbeið i í meira enn tvey ára tíggju.

Nevndin í Eimskip hevur sum uppgávu at styrkja og menna Eimskip. Nevndin hevur lagt nýggjar ætlanir, sum bera í sær økt avkastkrav á kjarnuøkjum Eimskips, at laga og menna tænastustøði til verandi eftirspurning og at leita upp fleiri vakstrarøki, bæði í Íslandi, Føroyum og aðrastaðni. Baldur hevur tikið lut í nýggju ætlanunum og fer, saman við starvsfólki annars, at laga felagsins arbeiði og bygna til nýggju ætlanirnar.

Baldur tók við sum stjóri tann 17. mai. Hann er 38 ára gamal og er útbúgvin MBA frá lærda háskúlanum í Reykjavík. Hann er giftur og eigur trý børn.

Baldur hevur í 15 ár arbeitt innan flutning, bæði í Íslandi og uttanlands. Seinastu fýra árini hevur hann verið stjóri og eigari av felagnum Sjøfn hf. á Akureyri. Hann hevur tikið seg aftur sum stjóri á Sjøfn hf. og er givin við arbeiði sínum í øðrum feløgum, harímillum sum nevndarformaður á Ingvar Helgason hf. og Hans Petersen hf.

Baldur heldur fram sum nevndarlimur í Icelandic Group hf og í stjórnini á Lærda Háskúlanum á Akureyri.

Málið hjá Eimskip er framhaldandi, at Norðuratlantshavið er heimamarknaðurin, og at felagið veksur innan altjóða flutning, herundir í Baltisku londunum, Norðsjónum og við Miðjarahavið.

Tað eru sera stórir vakstrarmøguleikar á fremmandum marknaðum, har felagsins tænasta, umdømi og royndir, saman við 20 skrivstovum í 11 londum, ger tað møguligt hjá Eimskip at vaksa, bæði gjøgnum innanhýsis vøkstur og við keypi av feløgum í nevndu økjum. Málið er at røkka øktum vinningi og vøkstri og at skráseta Eimskip, sum sjálvstøðugt felag á íslendska partabrævamarknaðinum seint næsta ár.

# Ein »detalja« útsetti aðalfundin

**– Tað var ein av fundarluttakarunum, sum gjørdi var við, at ein "detalja" í fráboðanini ikki var heilt, sum hon átti at vera, sigur Olaf Olsen, nevndarlimur í FMF**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Aðalfundurin hjá Fiskamarknaði Føroya verður komandi týsdag. Á skránni verður eitt nú uppskot um broytingar í bygnaðinum av FMF*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Aðalfundurin hjá Fiskamarknaði Føroya, sum varð lýstur at vera herfyri, varð útsettur eftir, at fundarluttakararnir vóru møttir, og fundurin varð settur.

Olaf Olsen, nevndarlimur í FMF, sigur, at tað var ein "detalja" í fráboðanini um fundin, sum var orsøkin til, at fundurin varð útsettur eina góða viku.

– Tað var ein av fundarluttakarunum, sum gjørdi var við, at ein "detalja" í fráboðanini ikki var heilt, sum hon átti at vera. Vit høvdu sakførara við á fundinum, og hesin varð eisini settur fundarstjóri. Við tað, at broytingar í skipanini av Fiskamarknaði Føroya vóru á skránni, varð mett, at betur var vat útseta fundin til komandi týsdag við somu dagsskrá, sum annars var til hendan fundin.

Olaf Olsen, sum hevur verið formaður í nevndini hjá FMF í fleiri ár, heldur ikki, at tað var nøkur vanlukka fyri tann skuld, at aðalfundurin varð útsettur eina góða viku.

– Tá ið ivi varð reistur um fráboðanina um fundin, haldi eg, at tað var rætt at broyta fundardagin, so alt í hvussu er fer rætt fram, tá ið aðalfundurin verður, sigur hann.

## Dagurin

**4. juni. Obtatus**, deyður umleið ár 390. Var upprunaliga heiðin maður, sum gjørdist kristin og endaði sum biskupur í Milevis í Numidiu. Hann doyði strádeyðan.

## Minningarhald

Sagt verður frá, at minningarhald fyri okkara kæra bróðir, mammu- og pápabeiggja, ommu- og abbabeiggja

**Sigvald Hentze**
Hvalba

fallin í Norðbergi 1. mai 2004, verður í Hvalbiar kirkju sunnudagin hin 13. juni 2004 kl. 13.30.

**Familjan**